## Boysarnir á pall í Hollandi

Í kvøld fara Boys in a Band á pall á Eurosonic í Hollandi, sum er millum leiðandi evropeiski festivalarnar í Evropa, og tann fremsti tá tað snýr seg um at leita fram alt tað nýggjasta og mest spennandi rytmiskan tónleik. Stórur partur av framførslunum verða sendar kring alt Evropa og eini 2500 fakfólk úr serliga live-tónleikavinnuni – bookarar, agentar, fyriskiparar, útvarps-dj´ar og onnur hittast til ráðstevnu, aðalfundir og serliga at hoyra umleið 250 nýggjar bólkar, sum eru útvaldir, tí mett verður, at júst hesir bólkarnar hava serliga góðan møguleika at seta dám á vinnuna næstu árini. Teirra millum eru føroysku Boys in a Band.



## 200 á Danmarkar-turné

Punkbólkurin 200 skal spæla sjey konsertir í Danmark í apríl. Danska blaðið Gaffa skrivar, at 200 hevur eitt gott tak á føroyingum, og eru eisini við at fáa fatur í dønum. Gaffa hevur áður ummælt 200 og skotsmálið var tá, at tónleikurin var “en aggressiv, post-punket stil, der kan give mindelser om Nick Caves Birthday Party”. 200 spælir 9. apríl í Herning, 10. apríl í Kolding, 12. apríl í Roskilde, 16. apríl í Keypmannahavn, 17. apríl í Århus, 18. apríl í Viborg og 19. apríl í Aalborg.

# Føroyar hava ongan

**Rúspolitikkur er eitt forsømt øki í Føroyum. Hetta kom týðiliga fram á einum politiskum panelfundi í Miðlahúsinum í gjárkvøldið. Tað var Blái Krossur, sum saman við Rás2 skipaði fyri fundinum, sum gjørdist bæði upplýsandi og áhugaverdur**

VAL 08

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



Lat tað verða sagt beinanvegin: Fundurin í Miðlahúsinum í gjárkvøldið um rúsevnispolitikk, sum Blái Krossur saman við Rás2 skipaði fyri, gjørdist eitt hitt.

Tað vóru bæði Hjalmar Hansen, aðalskrivari í Bláa Krossi, luttakandi politikkararnir og áhoyrarafjøldin í Miðlahúsinum á einum máli um.

Men tá tað er sagt, so má eisini sigast, at eftir fundin sat tú við einari greiðari kenslu av, at júst hetta økið hevur verið eitt forsømt øki í alt ov langa tíð. Og júst tí má tað sigast at vera ógvuliga heppi, at tað eydnaðist Bláa Krossi at varpa ljós á rúsdrekkatrupulleikan.

Hjalmar Hansen fekk fyrst orðið og greiddi frá orsøkunum til, at felagsskapurin hevði tikið stig til fundin. Og orsøkin var einføld, nevniliga fyri at sera fokus á rúsevnispolitikkin – ella rættari sagt vantandi rúsevnispolitikkin – í Føroyum.

Hann nevndi, at tað blivu bert einstøk mál tikin fram – skeinking umborð á Smyrli og líknandi, men tað sum vantar er ein yvirorðnaður og greitt orðaður rúsevnispolitikkur. Ikki rúsdrekkapolitikkur, men rúsevnispolitikkur.

Allir teir seks etableraðu flokkarnir luttóku, bert nýggi og til høvið stovnði Miðnámsskúlaflokkurin var ikki við. Í panelinum sótu: fyri Fólkaflokkin Hans Norðfoss, fyri Sambandið Alfred Olsen, fyri Javnaðin Kristian Magnussen, fyri sjálvstýrið Alice Højsted, fyri Tjóðveldi Finnur Helmsdal og fyri Miðflokkin Jaspur Langgaard.

Orðaskiftið gekk fyri seg á tann hátt, at fyrst fingu flokkarnir høvi til at gera eitt stutt innlegg um evnið, og síðani setti Jón Brian Hvidtfeld, fundarleiðari, fram spurningin, hvat flokkarnir hildu um verandi rúsdrekkalóg.

### Eingin stór ósemja

Í tí stóra og heila vóru flokkarnir ógvuliga nógv á einum máli um, at verandi rúsdrekkalóg ikki var so heilt út av lagi.

Bæði Hans Norðfoss og Kristian Magnussen vóru á einum máli um, at lógin virkaði í stóran mun eftir ætlan, nevniliga tálmandi. Kristian Magnussen vísti á, at tað vóru tveir faktorar, sum skuldu leggja ein dempara á hugin hjá fólki at keypa rúsdrekka, og teir vóru atkomiligheit og prísir. Í báðum førum metti hann, at lógin virkaði eftir ætlan.

Hans Norðfoss vísti síðani á, at rúsdrekkavanarnir hjá føroyingum gingu tann vegin, at føroyingar drukku alsamt veikari løgir, sum eisini er nakað, ið virkar tálmandi upp á nýtsluna.

Umboðini úr Sambandinum, Sjálvstýrinum og Miðflokkinum vístu á, at okkurt haltaði. Alfred Olsen helt, at rúsdrekkalógin var vorðin fríari og fríari, og sum dømi nevndi hann, at eftir at lógarteksturin var broyttur frá, at ein loyvishavari kundi í staðin fyri skuldi missa loyvi, forbreyt hann seg ímóti ásetingunum, hevði eingin mist loyvið.

Alice Højsted helt, at lógin kundi ikki vera nøktandi, tá talan var um eina øking í volumen av rúsdrekka, sum føroyingar inntaka. Hon helt eisini, at tað kundi verða ein vandi í at drekka meir, sjálvt um tað var veikari, tí fólk lættari tá kunnu gerast misnýtarar. Hetta er annars eitt argument sum vanliga gongur beint øvugtan veg.

Jaspur Langgaard helt, at prísurin var á einari leið og atkomiligheitin sum so eisini, men hevði tó her ta viðmerking, at sølustøðini gjørdust alt fleiri, og harvið gjørdist rúsdrekka eisini lættari atkomiligt. Hann nevni serliga skeinkiloyvið til Smyril, tað, at nú er loyvt at skeinkja uttandura og so festivalarnar, sum ikki longur kunnu yvirliva uttan. Ironiskt, helt hann, at tann elsti og størsti nú var farin á húsagang, eftir at hava fingið skeinkiloyvi.

Finnur Helmsdal var hann, sum vildi mýkja lógina mest. Hann segði seg einki hava ímóti, at rúsdrekka fór út í handlarnar, men tað skuldi framvegis vera Rúsan, sum stóð fyri søluni.

### Aftur til gomlu skipanina

Síðani var spurningurin um nóg nógv var gjørt fyri at fyribyrgja rúsdrekkanýtslu, ella rættari sagt ótálmaðari nýtslu. Og her vóru øll samd: Hetta er eitt øki, sum hevur verið púrastani forsømt.

Mest sum alt panelið var á einum máli um, at síðani ymsu ráðini vórðu løgd saman í Fyribyrgingarráðið, var rúsdrekka niðurraðfest í denn grad. Finnur Helmsdal vildi enntá vera við, at tað var heilt burturraðfest.

Ført var fram, at sjálvandi var tað prísverdugt, at FBR hevði gjørt eitt so stórt og gott arbeiði við at upplýsa og royna at eggja fólki til at leggja av at roykja, og somuleiðis tað stóra arbeiði, ráðið gjørdi fyri at varpa ljós á fólkaheilsuna, men tá hesi tiltøk skuldu ganga út yvir fyribyrgjandi arbeiðinum móti rúsdrekkanýtslu, vóru tey næstan betri ógjørd.

Flestu í panelinum mæltu beinleiðis til, at vent var aftur til gomlu skipanina, har hvørt ráð hevði sítt øki, sum tað síðani kundi nýta alla sína orku uppá.

Í hesum sambandi vóru eisini sjálvboðnu felagsskapirnir, sum gera eitt eftir førimuni ógvuliga stórt arbeiði á økinum, nevndir. Spurnartekin var sett við, um tað ikki hevði verið rætt at stuðla hesum sjálvboðnu felagsskapum, heldur enn at nýta peningin til Fyribyrgingarráðið.

Onkur vísti á, at Ráðið fyri Ferðslutrygd, sum ikki varð koyrt í sama pott undir FBR, var bæði virki og effektivt við nógvum og munadyggum átøkum. So niðurstøðan var, at hóast FBR hevði virkað á summum økjum, so hevði tað als ikki virka sum fyribyrgingarráð, tá tað kom til rúsdrekkaspurningin, og tí var mest sum semja um, at